Elnevndin
MYNDUGLEIKI INNAN ELLÓGGÁVUNA

# Ljós í myrkrinum



**LJÓS Í TUNLUM: Sum liður í arbeiðinum at tryggja ferðsluna í tunlunum er Landsverk í gongd við at dagføra tunlarnar við ljósi og trygdarútbúnaði. Í løtuni verður arbeitt við at dagføra Leynartunnilin, og í hesum sambandi verður arbeitt við einari spennandi royndarskipan við orkusparandi dioduljósum.**

Tá tunlar og vegakervið sum heild verða tryggjað og dagførd, er umráðandi at hyggja at heildini, so mest møgulig trygd fæst fyri pengarnar. Tunlarnir í Føroyum eru ikki ótryggir at koyra í. Hagfrøðiliga sæð eru teir eins tryggir ella tryggari enn vegakervið annars. Men av tí at avleiðingarnar av einum óhappi í einum tunli kunnu gerast ógvusligari enn á vegakervinum, verður miðja móti at tunlar verða gjørdir enn tryggari enn vegakervið annars. Dagføring av tunlunum er tí raðfest, m.a. í Samferðsluætlanini 2008-2020. Har er eitt av settu málunum at dagføra allar tunlar í Føroyum, so teir hava neyðuga trygdarútbúnaðin. Tunlar við nógvari ferðslu verða dagførdir eftir trygdarkrøvum frá norsku normum, meðan tunlar við minni ferðslu verða dagførdir við rýmingarljósum og sløkkiútgerð.

## Ljósið fyribyrgir óhappum

Trygdin í tunlum er samansett av ymiskum viðurskiftum, sum kunnu býtast sundur í tveir høvuðsbólkar:

At fyribyrgja at óhapp henda, og síðani at avmarka avleiðingarnar um óhapp henda kortini.

Arbeiðið umfatar at byggja og innrætta nýggjar tunlar rætt, dagføring av verandi tunlum við neyðugari trygdarútgerð, ger av tilbúgvingarætlanum og útbúgving av fólki í tilbúgvingini. Harumframt eisini at upplýsa tey ferðandi um rættan atburð í sambandi við óhapp í tunlum.

Kanningar úr m.a. Noregi vísa, at umframt at tunlar rúmfrøðiliga vera bygdir rætt (t.d. hædd, breidd, sving (bend) og brekkur), so er innrættan av tunlum við ljósi við til at fyribyrgja at óhapp henda. Ljós í tunlum vísa seg betra ferðslutrygdina, meðan restin av trygdarútbúnaðinum er við til at minka um skaðan um óhapp henda. Kanningar úr Noregi vísa, at ljósskipanir í tunlum kunnu minka um talið á óhappum við um 35 %. Kanningarnar vísa eisini, at ein stórur partur av óhappunum henda, tá koyrt verður inn í tunnilin. Ljós er serstakliga umráðandi í inngangsumráðunum í tunlunum. Er ljóst uttanfyri, og komið verður inn í ein myrkan tunnil, kann tað ørkymla bilføraran.


*Leynatunnilin*

## Ætlan fyri dagføring av tunlum

Landsverk hevur ábyrgdina av rakstrinum av 16 av teimum 18 tunlunum í Føroyum, undantiknir eru báðir undirsjóvartunlarnir.